# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Viljin til vitanarsamfelagið

Í gjár handaði løgmaður nýggju landsstýriskvinnuni í mentamálum, Óluvu Klettskarð, innsetingarskjalið – samstundis sum hann gav Kristinu Háfoss, fráfaringarskjalið, sum endaliga váttar, at hon er farin úr starvi.

Hetta er sekstanda landsstýrisfólk, sum Jóannes Eidesgaard tilnevnir – men kortini bara triði mentamálaráðharrin. Tá undanmaður løgmans, Anfinn Kallsberg hevði verið eins drúgvur í sessinum, sum Eidesgaard, hevði hann longu havt seks tjóðveldisfólk í Mentamálaráðnum. Okkurt bendir á, at hesin sessur er serliga heitur hjá tjóðveldisfólki.

Vit fara kortini á hesum stað at ynskja nýggju landsstýriskvinnuni bestu eydnu og gott treysti í nýggja starvinum. Vit harmast eisini, at Kristina Háfoss legði kongin, tí mangt bendi á, at hon var ein dugnalig landsstýriskvinna og ein dugnaligur politikari, sum vit kundu væntað okkum nógv av. Nú hon trínir av politiska pallinum, kann hetta eisini verða eitt endaligt farvæl til politikk, tí hon telist ikki millum parlamentarikararnar – og kann lættliga verða gloymd, tá vit einaferð koma fram til eitt løgtingsval. Politiska minnið er so stutt, og veljarin gloymir skjótt fráfarnar politikarar. Men Kristina Háfoss er ung, og hon kann saktans gera eitt come-back, júst sum hon gjørdi hendan mándagsseinnapartin í februar, tá hon varð tilnevnd landsstýriskvinna.

Nýggja landsstýriskvinnan hevur sínar røtur í útjaðaranum – hon er uppvaksin á útoyggj, tó at Kunoyggin við samferðsluútbyggingunum er knýtt at meginøkinum. Hetta er óivað ein dygd – tað at verða grundfest á bygd og í útjaðara, samstundis sum hon fakliga er so væl skikkað til starvið.

Óluva Klettskarð hevur boðað frá, at um vit vilja verða eitt vitanarsamfelag, so kostar tað pengar. Og tað merkir, at fleiri pengar skulu játtast á mentanarøkinum.

Spurningurin er, hvussu stóra ávikan hon hevur – og um hon megnar at sannføra fíggjarmálaráðharra, fíggjarnevnd og meiriluta á tingi til tess. Fleiri hava roynt hetta. Nú eru tað so fólk úr Norðoyggjum, sum bæði sita á landskassanum, á fíggjarnevnd og á Mentamálaráðnum. Øll fólk, sum hava tosað nógv fyri gransking og menning á útbúgvingarøkinum.

Vit eru helst øll samd um, at meira orka skal setast av til mentanar- og útbúgvingarøkið – og at hetta skal raðfestast hægri. Men vit sakna tann politikararan, sum megnar at fáa framt hetta politiska verkið. Hesum ynskja vit Óluvu Klettskarð bestu eydnu við.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**37. partur**

Vit fóru skjótt gjøgnum gamla testamentið í seinasta parti, og víst varð á nakrar hendingar um Messias, sum koma skuldi, og eisini myndir av hesum.

Tá ið so Malakias leggur skriviamboð sítt niður, verður tøgn í umleið fýrahundrað ár. Men tá ið hesi árini eru gingin, stígur veldigur profetur fram í Ísrael. Undangongumaður Messiasar, Jóhannes doypari. Um hann sigur Harrin Jesus hetta:

Ella hvat fóru tit út at síggja? Profet? Ja, sigi Eg tykkum: Og meir enn profet!

Hann er tann, ið skrivað er um: "Eg sendi boðbera Mín undan Tær; hann skal gera Tær veg Tín til reiðar".

Eg sigi tykkum: Størri profetur enn Jóhannes er ikki millum teirra, ið føddir eru av kvinnu; men hin minsti í ríki Guds er størri enn hann. Luk. 7, 26-28.

Ikki vóru mong, ið vóru vakjandi viðvíkjandi tí, sum gamla testamentið hevði lovað. Tó onkur var. Símeon gamla og Onnu Fanuelsdóttir lesa vit um í Luk. 2. kapitli. Tey komu bæði inn í templið, tá ið jesubarnið varð borið inn hagar.

Jóhannes prætikaði og doypti í Jordan. Hann segði, at eftir hann kom tann ið, hann ikki var verdugur at loysa skóreimina hjá og bað fólkið trúgva á hann.

Jesus vaks nú upp, og vit vita ikki nógv um tíðina hjá honum, til hann var tríati. Men tá ið hann var um tríati, steig hann fram og prætikaði, og sum hann sigur sjálvur einaferð, at hann var sendur til Ísrael. Tó hann koyrdi ongan burtur, sum kom til hansara. Eg fari ikki at gera so nógv burtur úr, hvat tey fýra evangeliini fortelja okkum. Føroyingar mangir kenna tey so væl. Tey verða jú lisin upp og talað yvir í kirkjunum hvønn sunnu og heilidag. Men Jóhannes evangelistur sigur okkum, at hann kom til síni egnu, men tey tóku ikki ímóti honum.

Menniskjað er sær sjálvum líkt altíð. Tey dámdu at lurta eftir Jesusi og síggja kraftargerðirnar, sum hann gjørdi, vónaðu helst at hann skuldi fríða tey undan tí rómverska okinum. Men eftir einari viku skiftu tey hugburð móti honum, og frá at rópa :" Hosianna, sonur Dávids," fóru tey yvir til at rópa :" Krossfest, krossfest hann." Paulus sigur hetta um heidningarnar í efesusbrævinum 4,18:

Tí teir eru blindaðir í hugsan síni og gjørdir lívi Guds fremmandir. Hetta stendst av vankunnleikanum, sum teir liva í, av tí at hjarta teirra er forherðað.

Hetta kann nokk sigast um jødarnar við. Teir vilja ikki góðtaka Jesus frá Nazareth sum Messias, tí teir kenna ikki skriftirnar. Skriftirnar tala so týðuliga allan vegin, sum vit eisini hava sæð gjøgnum hesar stubbar, sum eg havi skrivað, at Messias skal koma, og at hann ikki bert er frelsari jødana, men er frelsari alra tjóða. Hvussu lesa jødarnir Es. 53, tá ið teir ikki fáa eyguni upp fyri, at har er talan um Jesus frá Nazareth og líðingar hansara. Paulus, sum sjálvur var jødi, sigur at hjarta teirra er forherða. Tað er øðiligt at liva her og vraka skriftirnar. Jesus sigur við sadukeararnar "Tit villast, tí tit kenna ikki skriftirnar." Jesus sigur í hini ræðuligu hendingini um ríka mann og Lazarus, at trúgva vit ikki skriftunum, lata vit okkum ikki yvirtala, um onkur rísur frá teimum deyðu. Lat meg enda hendan partin við hesum, skrivað til jødarnar, men til lærdóm fyri øll menniskju.

Hesi orð, sum eg í dag áleggi tær, skalt tú goyma í hjartanum; tú skalt prenta tey inn í børn tíni við at tosa um tey, bæði táið tú situr heima við hús, og táið tú gongur á vegnum, bæði táið tú legst, og táið tú fert upp; tú skalt binda tær tey sum tekin á hondina, og tey skulu vera tær sum minnisseðil á pannuni; tú skalt skriva tey á durastavirnar í húsi tínum og á portur tíni. 5.mós.6,6-9.

**Framhald**

## Fjarðarfestivalur í Skálafirði, ikki Fjarðafestivalur í Skálabotni!?

EYÐUN Á BORG



Skálfirðingar, hvar búgva teir?

FJARÐAR/FJARÐA: Verður hugsað um ein fjørð, Skálafjørð, so eitur festivalurin Fjarðarfestivalurin (fjarðar er hvørsfall eintal). Verður sipað til fleiri firðir, t.d. millum Fjarða, so skriva vit Fjarðafestivalurin (fjarða er hvørsfall fleirtal).

Tað sama er galdandi við t.d. Fjarðahúsum. Er talan um fleiri firðir, so eitur tað Fjarðahús. Tosa vit um ein fjørð, t.d. inni á/í Firði, so skriva vit Fjarðarhús.

SKÁLAFJØRÐUR/ KALDBAKSBOTNUR: Okkara frálíka atlas sigur Skálafjørður og Kaldbaksbotnur. Eitur tað botnur, tá høgt er uppfyri, sum t.d. í Kaldbaksbotni? Hvat siga tey staðkønu? Okkurt eitur annars fjarðarbotnur!?

SKÁLFIRÐINGAR: Í Kollafirði búgva kollfirðingar; í Skálavík búgva skálvíkingar. Búgva skálfirðingar so í Skálafirði ella kring allan Skálafjørðin? Vakurt orð annars, skálfirðingar.

FESTIVALUR: Hví ikki fagnaður, ella kanska stevna!?

E. S.: Septembur: Skrivið nú ur-ending! Hvat av bløðunum torir fyrst?

*Við fjarðarfagnaðarkvøðu*
*Á Borg á Árgjum í akurskurð 2008*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.